# Taliban hóttir veljararnar



Taliban roynir av øllum alvi at órógva forsetavalið í Afghanistan, sum verður hósdagin. Gjáramorgunin kunngjørdi rørslan, at hon fer at søkja at valstøðum og at skera fingrar av fólki, sum fara á val. Í einum faldara, sum rørslan sendi út har suðuri í landinum, stóð eisini, at menn hjá Taliban fara at skera oyru av fólki, sum fara á val. Samstundis hevur Taliban hert ágangin, og um vikuskiftið kravdi ein sjálvmorðsbumba níggju mannalív í Kabul. Umleið 100 fólk fingu skaða, og teirra millum var Hawa Nuristani, sum er ein av teimum fáu kvinnunum í afghanska tjóðartinginum.

# Færri doyggja í ferðsluni

Nógv færri danir doyggja í ferðsluni í ár enn undanfarin ár. Burtursæð frá apríl hevur ferðslan kravt færri mannalív allar hinar mánaðirnar, og tølini fyri summarmánaðirnar eru seks prosent minni enn somu mánaðir í fjør, sigur DR. Stjórin í danska Ráðnum fyri Ferðslutrygd, Anders Rosbo, væntar, at hetta summarið verður eitt av teimum góðu í ferðslutrygdarhøpi. Um Um orsøkina til ta jaligu gongdina sigur, at løgreglan hevur gjørt fleiri kanningar í ár, fíggjarkreppan ger sítt, og harafturat hava færri vanlukkur verið við prutlum í ár.



*Leðin gekk av Eiði til Hósvíkar, har bátarnir lógu nátt. Ætlanin var at sigla víðari til Nólsoyar leygardagin, men veðrið var so vánaligt, at fleiri av bátunum settust aftur - og summir fóru ikki avstað fyrr enn sunnudagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Bátafylgi fór av Eiði klokkan fimm seinnapartin fríggjadagin. Henda myndin er tikin av brúnni um Streymin um hálvgumsjeytíðina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Nakrir fáir áskoðarar vóru til fótbóltsdystin, men teir vóru eisini ílætnir til veðrið*



*Tónleikararnir troðsaðu veður og vind og leiktu obligatoriska fótbóltsdystin*



*Eitt av sera áhugaverdu tiltøkunum var málningaframsýningin hjá Steffani Danielsen. Emil Juul Thomsen, sum eigur málningarnar, og Kinna Poulsen, sum valdi teir 17 út, vóru til setanina*



*Lagið var kortini gott leygarkvøldið í tjaldinum á keiini*